# LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR

## FÍGGJARÁRIÐ 2007

# SAMANDRÁTTUR AV FRÁGREIÐINGUM

## FRÁ PRIVATUM GRANNSKOÐARUM
## UM GRANNSKOÐAN AV GRUNNUM/STOVNUM
## SUM ERU VIÐ Í LANDSROKNSKAPINUM 2007

JANUAR 2009

Traðagøta 43 • Postrúm 2053 • FO-165 Argir
Tlf. (298) 355100 • Fax (298) 355101 • Teldupostur: postur@lg.fo
WWW.LG.FO

# Innihaldsyvirlit

1 INNGANGUR 3

2 FISKIVINNA 4

2.1 FORSKOTSGRUNNUR FISKIFLOTANS 4

3 VINNUMÁL 4

3.1 VINNUFRAMAGRUNNURIN 4
3.2 BÚNAÐARGRUNNURIN 4
3.3 BARSILSSKIPANIN 4

4 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 4

4.1 GRANSKINGARVERKÆTLAN FYRI ØKISMENNING 4
4.2 KRINGVARP FØROYA 5
4.3 SERNÁMSDEPILIN 5
4.4 SKÚLIN Á TRØÐNI 5
4.5 GRANSKINGARGRUNNURIN 5
4.6 FØROYA HANDILSSKÚLI 5
4.7 TEKNISKI SKÚLI Í TÓRSHAVN 5
4.8 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK 5
4.9 LISTASAVN FØROYA 5

5 HEILSUMÁL 6

5.1 APOTEKSVERK FØROYA 6
5.2 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ 6
5.3 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS 6
5.4 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS 6
5.5 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS 6
5.6 MEDICOTEKNISK TÓL 6
5.7 DEILDIN FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU 6
5.8 HOTEL TÓRSHAVN 7
5.9 VIÐGERÐASTOVNURIN HEILBRIGDIÐ 7
5.10 VIÐGERÐASTOVNURIN BLÁKROSSHEIMIÐ 7

6 ALMANNAMÁL 7

6.1 FØROYA BLINDASTOVNUR 7
6.2 ALV-SKÚLIN VIÐ ÁIR 7
6.3 FØROYA BARNAHEIM 7
6.4 HVÍLDARHEIMIÐ NAINA 7
6.5 FRÍTÍÐARHEIMIÐ Í SKRIVARAGØTU 7
6.6 SAMBÝLIÐ "EYSTURSTRÆTI 4" 7
6.7 BÚSTOVNURIN "SÓLTEIGUR" 7
6.8 UMLÆTTINGARHEIMIÐ "DÁIN" 7
6.9 NORÐOYA ELLIS– OG VISTARHEIM 8
6.10 TÓRSHAVNAR PRIVATA VISTARHEIM 8
6.11 RØKTAR- OG UMLÆTTINGARHEIMIÐ "LÁGARGARÐUR" 8
6.12 TÓRSHAVNAR ELLIS- OG UMLÆTTINGARHEIM 8
6.13 ELLISHEIMIÐ "TJARNARGARÐUR", TÓRSHAVN 8
6.14 HEIMIÐ Í VALLALÍÐ, TÓRSHAVN 8
6.15 RØKTARHEIMIÐ Á SÝNINI Í VÁGUM 8

6.16 HEIMIÐ Á MÝRUNUM, RUNAVÍK 8
6.17 EYSTUROYAR RØKTAR- OG ELLISHEIM 8
6.18 NORÐOYA RØKTARHEIM OG SUÐUROYAR RØKTARHEIM 8
6.19 GRUNNUR ÆTLAÐUR BREKAÐUM (HAPPADRÁTTARGRUNNURIN) 9

7 INNLENDISMÁL 9

7.1 HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTURIN 9
7.2 STRANDFARASKIP LANDSINS 9

# 1 Inngangur

Sambært § 7 í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.” fevnir roknskapargrannskoðanin m.a. um árliga landsroknskapin, t.v.s. roknskapir fyri virkseminum hjá landsumsitingini og hjá landsstovnum o.ø. umframt roknskapir hjá øðrum stovnum o.a., hvørs rakstrarætlan er tikin við í játtanarlóg.

Hjá nøkrum landsstovnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðara. Í øðrum førum er grannskoðanin sambært avtalu ella siðvenju, t.d. sjúkrahúsverkið.

Harumframt grannskoða privatir grannskoðarar grunnar og sjálvsognarstovnar o.a., hvørs rakstrarætlan er tikin við á fíggjarlógina sum rakstrarjáttan, t.d. vinnuskúlar og røktar- og ellisheim.

Nakrir landsstovnar og -grunnar, sum verða grannskoðaðir av privatum grannskoðarum, eru tiknir við í landsroknskapin sum fylgiskjøl undir “eksternir grunnar”. Talan er um:

- Grunnur ætlaður brekaðum,
- Forskotsgrunnur fiskiflotans,
- Vinnuframagrunnurin,
- Granskingargrunnurin,
- Búnaðargrunnurin.

Sambært § 12 í grannskoðanarlógini skal frágreiðingin fyrst verða løgd fyri landsstýrismannin til viðmerkingar, og í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar skulu verða tiknar við møguligar viðmerkingar og fráboðanar frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til.

Áðrenn ein frágreiðing verður latin landsstýrismanninum, hevur avvarðandi stovnsleiðari vanliga havt høvi til at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina, og eftir áheitan skal roknskapargrannskoðanin kunna landsstýrismannin um, í hvønn mun og á hvønn hátt grannskoðað hevur verið. Landsstýrismaðurin og stovnsleiðarar kunnu tí í ein ávísan mun nýta frágreiðingarnar frá roknskapargrannskoðanini sum eftirlitsamboð, m.a. á roknskaparøkinum.

Sambært § 13 kann ein og hvør kunna seg um tær frágreiðingar, sum roknskapargrannskoðanin letur løgtingsgrannskoðarunum. Harvið fær almenningurin eisini innlit í grannskoðanararbeiðið.

# 2 Fiskivinna

## 2.1 Forskotsgrunnur fiskiflotans

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

# 3 Vinnumál

## 3.1 Vinnuframagrunnurin

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 3.2 Búnaðargrunnurin

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Sambært viðmerkingunum í landsroknskapinum hevur Búnaðargrunnurin ikki vilja latið Gjaldstovuni roknskapardátur fyri 2007.

Grannskoðarin mælir til, at mannagongdir verða gjørdar fyri tekning av tryggingum.

Grannskoðarin viðmerkir, at lán sum stjórin játtar einsamallur og kunnar stýrið um munnliga, ikki altíð verða upplýst í fundarbókunum hjá stýrinum. Grannskoðarin mælir til, at mannagongdin viðvíkjandi játtan av lánum verður formaliserað, soleiðis at stjórin, umframt at kunnað stýrið munnliga, eisini eftirfylgjandi fær hesa kunning nevnda í fundarbókunum.

## 3.3 Barsilsskipanin

Grannskoðaravirkið Rasmussen & Weihe hevur grannskoðað roknskapin. Barsilsskipanin verður umsitin av Arbeiðsloysisskipanini. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin hevur í apríl 2008 kunnað um – eins og undanfarin ár – at grannskoðanin hevur givið ábendingar um, at útgjaldsskipanin hevur ymiskar tekniskar veikleikar. Umsitingin av Barsilsskipanini er vitandi um tað, og arbeitt verður leypandi við tí.

Grannskoðarin hevur eisini kunnað um, at bókhaldið fer fram á ymiskum skipanum, ið ger tað torført hjá umsitingini at hava fult yvirlit yvir støðuna hjá Barsilsskipanini. Grannskoðarin mælir til, at stílað verður móti at fáa samlað bókhaldið á ein slíkan hátt, at umsitingin og yvirlitið av skipanini gerst lættari.

# 4 Útbúgving og gransking

## 4.1 Granskingarverkætlan fyri økismenning

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin viðmerkir, at hvørki Mentamálaráðið ella leiðarin hava megnað at upplýsa, hvør situr í stýrinum. Tó hevur leiðarin upplýst, at stýrið ikki er virkið.

### 4.2 Kringvarp Føroya

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin mælir í mars 2008 til, at kredittveiting til serliga lýsingarskuldarar verða avmarkað meira, tí hóast teir størstu einstøku skuldararnir ikki eru øktir munandi í 2007, er eftir meting hjá grannskoðarunum talan um ov stórar einstakar upphæddir.

### 4.3 Sernámsdepilin

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 4.4 Skúlin á Trøðni

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 4.5 Granskingargrunnurin

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Sambært Ll. nr. 85/2001 skal nevndin gera eina starvsskipan, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna. Eitt uppskot varð 20. apríl 2005 sent landsstýrismanninum at góðkenna. Grannskoðarin kunnar um, at eingin góðkenning er komin frá landsstýrismanninum.

### 4.6 Føroya Handilsskúli

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 4.7 Tekniski skúli í Tórshavn

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 4.8 Tekniski skúli í Klaksvík

Grannskoðaravirkið Sp/f Numero hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 4.9 Listasavn Føroya

Grannskoðaravirkið Rasmussen & Weihe hevur grannskoðað roknskapin.

Grannskoðarin vísir á, at skilnaður er ikki millum atgongd til bókhald og atgongd til pening. Grannskoðarin ger tó vart við, at hann ikki er vorðin varugur við viðurskifti, sum benda á, at óregluligt virksemi hevur verið.

Grannskoðarin vísir eins og undanfarin ár á, at parturin av ársúrslitinum, ið fellir til landið, er ásettur av stýrinum í samráð við stjórnina, tí eingin formlig avtala er gjørd um, hvussu býtið av ársúrslitinum skal vera.

# 5 Heilsumál

## 5.1 Apoteksverk Føroya

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin mælir enn eina ferð til, at apoteksbygningurin í Runavík verður tikin inn í samlaða apoteksroknskapin, so roknskapurin vísir allar ognirnar hjá Apoteksverkinum. Grannskoðarin ger aftur vart við, at í eksterna roknskapi Apotekverksins verða íløgur avskrivaðar, og tí er ikki samsvar við landsroknskapin.

Grannskoðarin mælir eisini Apoteksverkinum til skrivliga at lýsa tey KT-trygdartiltøk, ið eru sett í verk, umframt at fara skipað til verka fyri at skipa ta KT-trygdina, ið krevst fyri at lúka ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini og rundskrivi frá Vinnumálaráðnum frá 21. juni 2007 um at seta í verk KT-trygd.

## 5.2 Landssjúkrahúsið

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin mælir enn eina ferð til, at fáa skipanina um privata viðtalu hjá yvirlæknum at virka í tráð við gjørdar avtalur.

Grannskoðarin viðmerkir enn einaferð, at eitt samlað ognaryvirlit er ikki enn gjørt fyri Landssjúkrahúsið.

Grannskoðarin kunnar um, at núverandi lønarskipan er soleiðis innrættað, at bæði starvsfólkadeildin og lønarskrivstovan kunnu bóka lønir og stovna lønarkontur. Mælt verður til, at hetta verður rættað, soleiðis at tað ikki kann koma fyri.

## 5.3 Klaksvíkar sjúkrahús

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 5.4 Suðuroyar sjúkrahús

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 5.5 Serviðgerð uttanlands

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 5.6 Medicoteknisk tól

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 5.7 Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 5.8 Hotel Tórshavn

Grannskoðaravirkið KPMG C. Jespersen hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 5.9 Viðgerðastovnurin Heilbrigdið

Grannskoðarastovan á Skála hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 5.10 Viðgerðastovnurin Blákrossheimið

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 6 Almannamál

### 6.1 Føroya Blindastovnur

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.2 ALV-skúlin við Áir

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.3 Føroya Barnaheim

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.4 Hvíldarheimið Naina

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.5 Frítíðarheimið í Skrivaragøtu

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.6 Sambýlið “Eystursstræti 4”

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.7 Bústovnurin “Sólteigur”

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.8 Umlættingarheimið “Dáin”

Grannskoðaravirkið v/Jóannis Skorheim hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.9 Norðoya Ellis– og Vistarheim

Grannskoðaravirkið v/Jóannis Skorheim hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.10 Tórshavnar Privata Vistarheim

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.11 Røktar- og Umlættingarheimið "Lágargarður"

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at. Løgtingsgrannskoðararnir hava ikki fingið grannskoðarafrágreiðingina.

### 6.12 Tórshavnar ellis- og umlættingarheim

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at. Løgtingsgrannskoðararnir hava ikki fingið grannskoðarafrágreiðingina.

### 6.13 Ellisheimið "Tjarnargarður", Tórshavn

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.14 Heimið í Vallalíð, Tórshavn

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.15 Røktarheimið Á Sýnini í Vágum

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.16 Heimið á Mýrunum, Runavík

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. mars 2007. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Frá 1. apríl 2007 er virksemið hjá Heiminum á Mýrunum lagt undir Eysturoyar røktar- og ellisheim.

### 6.17 Eysturoyar røktar- og ellisheim

Grannskoðarastovan á Skála hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

### 6.18 Norðoya røktarheim og Suðuroyar røktarheim

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapirnar. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin vísir á, at Klaksvíkar sjúkrahús og Norðoya røktarheim hava felags rakstur, og at Suðuroyar sjúkrahús og Suðuroyar røktarheim eisini hava felags rakstur. Sambært grannskoðaranum verður, eins og undanfarin ár, minni- ella meirnýtslan tilskrivað sjúkrahúsunum.

### 6.19 Grunnur ætlaður brekaðum (Happadráttargrunnurin)

Grannskoðaravirkið SPEKT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

# 7 Innlendismál

## 7.1 Hin Føroyski Happadrátturin

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

## 7.2 Strandfaraskip Landsins

Grannskoðaravirkið INPACT hevur grannskoðað roknskapin. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at.

Grannskoðarin hevur hesar ískoytisupplýsingar: Strandferðslan hevur við ársroknskaparlok eitt óavgjørt krav ímóti sær uppá havnargjøld og eitt viðvíkjandi lønarviðbót til starvsfólk. Avsett er ikki ímóti hesum, men Løgmanskrivstovan verður kunnað leypandi um gongdina í málinum. Vit vísa til leiðslunar umrøðu í ársfrágreiðingini á síðu 2. Eftir okkara fatan eru viðurskiftini nøktandi lýst, og vit taka undir við roknskaparligu viðgerðini.

Grannskoðarin viðmerkir, at innanhýsis avstemmingarnar eru ikki komnar í fasta legu enn, og eingin fullfíggjað avstemming er við árslok 2007, undantikið av banka- og giropeningi. Grannskoðarin heitir á leiðsluna um at fáa viðurskiftini í rættlag, og vísir á, at fyri at hava eina neyva fíggjarstýring er alneyðugt, at fastar mannagongdir viðvíkjandi umsiting og avstemming eru settar í verk.

Grannskoðarin viðmerkir eisini, at framvegis er eingin avstemming av Buscom-skipanini. Tó verður ansað eftir, at modilini verða lisin inn, og at burturmist/frámeldað modul ikki verða nýtt. Grannskoðarin metir, at viðurskiftini viðvíkjandi Buscom-skipanini eru ikki nøktandi.

Í ársfrágreiðingini verður kunnað um, at Buscom-skipanin ikki longur verður supporterað, og er í vanda fyri at steðga upp hvørja løtu. Strandfaraskip Landsins hevur í fleiri umførum víst á, at henda støða er ikki haldbar, og at ein nýggj skipan má finnast. Ongin fígging er fingin á fíggjarlógini til at fara í holt við at finna eina nýggja og nøktandi skipan fyri Buscom-skipanina.

Tænastu- og vøruskuldarar eru við árslok 2007 7 mió.kr. Tilsamans eru avsettar 2 mió.kr. ímóti tapi upp á skuldarar.